# Brúðarmyndir



*Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymsan hát gleddu okkum, og vóru við til at gera hjúnabandsdagin 2. juli 2005, so góðan og minnisríkan.*

**Anna, Christian, Max, Eli og Annfríð**



*Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið við gávum, telegrammum, heilsanum og á annan hátt, vóru við til at gera hjúnabandsdag okkara 9. juli 2005 so minnisríkan og hugnaligan.*

**Ritha og Eyðun Midjord, Hvalba**



*Vit vilja hjartaliga takka øllum tykkum, ið gleddust saman við okkum á brúdleypsdegi okkara tann 16 juli 2005. Stóra tøkk til øll tykkum, ið hjálptu til við fyrireiking.*

**Hanna & Mikaél Bisp**


STARVSLÝSING

## Arkitektur/Verkfrøðingur/Byggifrøðingur

**Ert tú áhugaður í nýggjum avbjóðingum á eini ungari deild í menning - verkleiðsludeildini hjá Landsverki? Verkleiðsludeildin varðar av øllum almennum byggiarbeiðum - vegabygging, tunnilsgerð, havnabygging og húsabygging - frá prosjekteringsbyrjan til avhending og garantisýn. Deildin var stovnað fyri umleið fimm árum síðani, og tann, ið verður settur, fer at luttaka í eini framhaldandi menning av deildini.**

### Arbeiðsuppgávur

Uppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna eitt nú um:

- byggiharraráðgeving
- prosjektstýring
- byggileiðslu
- samskifti við aðalráð, ráðgevarar, arbeiðstakarar og aðrar áhugabólkar
- útbjóðing
- sáttmálar við ráðgevarar og arbeiðstakarar
- prosjektgransking

### Førleikakrøv

Søkt verður eftir arkitekti/verkfrøðingi/byggifrøðingi ella fólki við aðrari viðkomandi útbúgving við góðum samstarvsevnum og áhuga fyri omanfyri nevndu málsøkjum. Starvið er sera sjálvstøðugt, og gevur tær góðar møguleikar fyri at fremja tínar hugsjónir í verki. Royndir innan eitt ella fleiri av nevndu virkisøkjum gevur fyrimun, men er eingin treyt, tí roknast kann við neyðugari upplæring ta fyrstu tíðina.

### Setanarviðurskifti

Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Arbeitt verður skiftitíð, og møguleikar eru fyri eftirútbúgving. Starvið verður sett skjótast til ber ella eftir nærri avtalu.

### Umsóknir

Umsókn við lívsgongdarlýsing (cv) verður at senda til:

Landsverk
Postsmoga 78
110 Tórshavn

og skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 15. september 2005.
Merkið brævbjálvan "verkfrøðingur til verkleiðsludeildina"

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.
Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Kristiani Rasmussen á tel. 311 333 (t-postur: kr@lv.fo).

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land